# Treytir í sambandi við fyrimunaskipan bankans, Nordik

Allir privatkundar í BankNordik kunnu søkja um at taka lut í fyrimunaskipan bankans, Nordik (eftir hetta nevnd ”fyrimunaskipanin”).

Tá ið bankin góðkennir umsókn og tilmelding til fyrimunaskipanina, er tað við støði í eini ítøkiligari kredittmeting og samlaðu fíggjarviðurskiftum kundans ella familjunnar við bankan. ”Familja” skal skiljast sum í mesta lagi 2 vaksin, ið eru skrásett at hava sama bústað umframt børn yngri enn 18 ár, ið búgva heima.

Tilmelding kundans til fyrimunaskipanina fær gildi, tá ið BankNordik hevur skrásett og góðkent tilmeldingina hjá kundanum/familjuni. Tilmeldingin hjá eini familju fær ikki gildi, fyrr enn BankNordik hevur skrásett og góðkent tilmeldingina hjá báðum vaksnum kundum. Um ein kundi meldar seg til sum familja, verður kundin mettur sum einstaklingur og meldaður til fyrimunaskipanina einsamallur, inntil restin av familjuni er skrásett og góðkend.

Tá ið tilmeldingin fær gildi, detta rentutreytir og prísir, ið higartil hava havt gildi, burtur, um hesi víkja frá prísbók bankans.

Fyrimunaskipanin er fyri einstaka kundan/familjuna galdandi í 12 mánaðir og verður longd hvønn 1. januar fyri eitt 12 mánaða skeið, um ikki BankNordik boðar kundanum/familjuni frá øðrum. Verður fyrimunaskipanin ikki longd, falla fyrimunir burtur, samstundis sum skipanin endar og kundin/familjan verður fevnd av vanligu prísum bankans, ið eru at finna í teirri til hvørja tíð galdandi prísbók. Les meira um gildistíð, uppsøgn og broytingar síðst í hesum treytum.

Fyrimunaskipanin hjá BankNordik hevur tvey stig: Nordik+ og NordikPremium. Hvørt stigið hevur serligar prísir, tænastur og fyrimunir knýttar at sær. Prísir, tænastur og fyrimunir í fyrimunaskipanini eru at síggja í teirri til hvørja tíð galdandi prísbók. Prísbókin er at finna á heimasíðuni www.banknordik.fo umframt á øllum deildum bankans. Meira fæst at vita um fyrimunirnar í fyrimunaskipanini á heimasíðu bankans www.banknordik.fo.

**Treytir í sambandi við luttøku í fyrimunaskipanini**
Allir kundar bankans eru ikki sjálvvirkandi partar av fyrimunaskipanini, men hvør einstakur kundi skal søkja um at kunna melda seg til skipanina. Hvat av stigunum í fyrimunaskipanini kundin/familjan kann melda seg til, er treytað av, hvørt kundin lýkur niðanfyri lýstu treytir, ið eru ásettar fyri einstøku stigini í fyrimunaskipanini.

Tilmelding til eitt stig í fyrimunaskipan bankans verður góðkend, um hesar treytir eru loknar:

Í Nordik+ skal kundin/familjan
1. hava eina virkna lønarkontu í BankNordik, ið er knýtt at Netbankanum
2. verða individuelt kredittmett/ur av bankanum til at kunna fáa allar fyrimunir og tænastur í Nordik+*
3. hava samlað fíggjarviðurskifti við bankan á í minsta lagi DKK 400.000 (sí allýsing av ”samlaðum fíggjarviðurskiftum við bankan” niðanfyri)

Í NordikPremium skal kundin /familjan:
1. hava eina virkna lønarkontu í BankNordik, ið er knýtt at Netbankanum
2. hava samlað fíggjarviðurskifti við bankan á í minsta lagi DKK 1.000.000 (sí allýsing av ”samlaðum fíggjarviðurskiftum við bankan” niðanfyri)
3. verða individuelt kredittmett/ur av bankanum til at kunna fáa allar fyrimunir og tænastur í NordikPremium**
4. vera góðkendur eftir individuellari meting

Samlaðu fíggjarviðurskifti kundans/familjunnar við bankan verða gjørd upp, tá meldað verður til fyrimunaskipanina og eftir hetta á síðsta bankadegi í hvørjum mánaði. Ein kredittmeting verður framd, tá meldað verður til, og eftir hetta metir bankin støðugt um kredittvirðið hjá kundanum/familjuni.

Kredittmetingin av kundanum verður framd við støði í ymiskum upplýsingum um kundan, m.a. inntøkuviðurskiftum, ogn, skuld, nýtslu, aldri og fyrrverandi fíggjarviðurskiftum.

Áseting av kundans rentu í rentuspenninum og broytingar av hesum
Fyri hvørt stigið er eitt rentuspenni ásett fyri útlán og kredittir, ið eru fevnd av fyrimunaskipanini. Tá ið kundin/familjan meldar seg til skipanina, verður viðkomandi, við støði í kreditvirði kundans/familjunnar, settur inn í rentuspennið á stignum, viðkomandi hevur meldað seg til.

Verður ein versnan av kredittvirðinum hjá kundanum/familjuni staðfest seinast í mánaðinum í tveir mánaðir á rað, kann bankin við 2 mánaða freist, og uttan samtykki frá kundanum/familjuni, geva kundanum/familjuni eitt verri rentustig við at broyta rentuásetingina innan fyri rentuspennið.

Kredittvirðið hjá kundanum/familjuni verður uppgjørt av BankNordik sum ein samlað meting av viðurskiftum kundans, undir hesum serliga skuldarlutfall (lutfall millum skuld og inntøkur), tiltøkupeningur (tøk upphædd eftir fíggingarútreiðslur og aðrar fastar útreiðslur), ognir, aldur, starv umframt broytingar í gjaldsmynstri og tøkum peningi hjá kundanum/familjuni.

Uppgerð av samlaðu fíggjarviðurskiftum kundans /familjunnar við bankan
Samlaðu fíggjarviðurskifti kundans/familjunnar við bankan verða gjørd upp sum ein samanlegging av:
- Saldum á útlánum í BankNordik
- Saldum á BankNordik kredittum

- Kursvirði á BankNordik virðisbrævagoymslum, ið eru knýttar at Persónligari PensjónsRøkt, Persónligari OgnarRøkt, Ráðgevingaravtalu og serstøkum ognarrøktaravtalum
- Kursvirði á íløguprógvum, ið eru útgivin av íløgufeløgum, sum BankNordik samstarvar við (eitt til hvørja tíð galdandi yvirlit yvir tílík íløgufeløg er at finna á heimasíðu bankans www.banknordik.fo), og sum eru sett í aðrar BankNordik virðisbrævagoymslur, enn virðisbrævagoymslur, ið eru knýttar at omanfyrinevndu ráðgevingar- og ognarrøktaravtalum
- Restskuldini á DLR-realkredittlánum, ið verða umsitin av BankNordik

Tá ið tveir persónar eru skrásettir í sambandi við tænastur/kontur, er galdandi, at hesar tænastur/kontur verða roknaðar við í samlaðu fíggjarviðurskiftunum við einum lutfalsligum parti av bókaðu salduni á tænastuni/kontuni til hvønn av skrásettu persónunum. Um báðir skrásettir persónar hava hava meldað seg til fyrimunaskipanina, verða fyrimunir og prísir ásettir eftir tí skrásetta persóni, ið verður góðkendur til besta stig. Um ein av skrásettu persónunum ikki hevur meldað seg til fyrimunaskipanina, verða fyrimunir og prísir í sambandi við hesa kontu ikki ásettir sambært fyrimunaskipanini, men sambært vanligu prísum bankans.

Tænastur/kontur, ið hava fleiri enn tveir eigarar, verða ikki roknaðar við í uppgerðini av samlaðu fíggjarviðurskiftum kundans/familjunnar og fylgja vanligu prísum bankans.

Tænastur/kontur á deildum bankans í Danmark og Grønlandi kunnu eisini vera partur av uppgerðini av samlaðu fíggjarviðurskiftum kundans/familjunnar við bankan. Hetta er tó treytað av, at kundin/familjan á hvørjum ári skjalprógvar hesar tænastur/kontur.

**Skifti millum ymisku stigini í fyrimunaskipanini**
Um uppgerðin á seinasta bankadegi í mánaðinum tveir mánaðir á rað vísir, at kundin/familjan ikki longur lýkur treytirnar fyri at vera partur av , Nordik+ ella NordikPremium, undir hesum treytirnar fyri samlaðum fíggjarviðurskiftum og kredittvirði, kann bankin við 2 mánaða freist, og uttan at kundin/familjan hevur givið sítt samtykki, flyta kundan/familjuna til tað stigið, ið javnsvarar samlaðu fíggjarviðurskiftunum við bankan og kredittvirði kundans/familjunar. Um kundin/familjan ikki lýkur treytirnar fyri Nordik+, undir hesum treytirnar fyri samlaðum fíggjarviðurskiftum og kredittvirði, verður kundin/familjan tó tikin úr fyrimunaskipanini.

Um kundin/familjan lýkur treytirnar fyri tí hægra stiginum í fyrimunaskipanini, kann viðkomandi heita á bankan um at luttaka á hægra stiginum. Tilmelding kundans til hægra stigið í fyrimunaskipanini fær gildi frá teirri løtu, ið BankNordik hevur skrásett og góðkent tilmeldingina hjá familjuni/kundanum.

Tá ið kundin/familjan skiftir stig, fara prísir og fyrimunir, ið eru galdandi fyri nýggja stigið, sjálvvirkandi at galda fyri kundan/familjuna. Um kundin/familjan ikki longur lýkur treytirnar fyri Nordik+, og harvið fellur úr fyrimunaskipanini, verður viðkomandi sjálvvirkandi fevndur av vanligu galdandi prísum bankans, sum eru at finna í teirri til hvørja tíð galdandi prísbók. Har prísbók bankans ásetir eitt spenni fyri prísir og fyrimunir á nýggja stignum ella fyri vanligu prísir bankans, t.d. eitt rentuspenni, verður kundin/familjan vanliga sett inn í hægsta enda av spenninum viðvíkjandi útlánum og kredittum og í lægsta enda av spenninum viðvíkjandi innlánum/samansparingum, undir hesum pensjónsavtalum.

Ávísar tænastur verða bert bodnar kundum/familjum á ávísum stigum. Um kundin/familjan flytur stig ella fer úr fyrimunaskipanini, verða samsvarandi tænastur á nýggja stignum ella vanligu tænastur bankans tískil veittar í staðin fyri hesar tænastur. Ber tað ikki til at seta samsvarandi tænastur í staðin, verður tænastan mett at vera uppsøgd, tá ið kundin skiftir stig ella fer úr fyrimunaskipanini.

Í prísbók bankans er eitt yvirlit yvir prísir, fyrimunir og tænastur, ið hoyra til einstøku stigini í fyrimunaskipanini.
Tað er ábyrgdin hjá kundanum/familjuni at kunna seg um nýggjar prísir og fyrimunir í sambandi við skifti til nýtt stig. Broytingar í rentutreytum hjá kundanum/familjuni verða at síggja í næsta kontuavriti.

**Gildistíð – luttøka í fyrimunaskipanini er tíðaravmarkað**
Luttøka kundans/familjunnar í fyrimunaskipanini er tíðaravmarkað til 12 mánaðir og heldur uppat hvønn 1. januar. Luttøkan verður longd hvønn 1. januar fyri eitt nýtt tíðarskeið á 12 mánaðir, uttan so at BankNordik áðrenn tann 1. januar boðar kundanum/familjuni frá øðrum. Verður fyrimunaskipanin ikki longd, falla fyrimunir burtur, tá ið skipanin heldur uppat og kundin/familjan verður fevnd av vanligu prísum bankans, ið eru at síggja í teirri til hvørja tíð galdandi prísbók. Har prísbók bankans ásetur eitt spenni fyri vanligu prísir bankans, t.d. eitt rentuspenni, verður kundin/familjan vanliga sett inn í hægsta enda av spenninum viðvíkjandi útlánum og kredittum og í lægsta enda av spenninum viðvíkjandi innlánum/samansparingum, undir hesum pensjónsavtalum.

Tá ið tilmelding til fyrimunaskipanina er farin fram, heldur luttøkan ikki uppat tann fyrsta 1. januar, men annan 1. januar, soleiðis at fyrsta tíðarskeiðið kann verða millum 12 og 24 mánaðir, alt eftir nær á árinum tilmeldingin fer fram.

Hóast luttøkan hjá kundanum/familjuni er tíðaravmarkað, er hetta eingin forðing fyri, at kundin/familjan av teimum orsøkum, ið annars eru lýstar í hesum treytum, fellur úr fyrimunaskipanini.

**Útmelding og uppsøgn**
Kundin/familjan kann til hvørja tíð siga seg burtur úr fyrimunaskipanini uttan freist.

Útmelding úr fyrimunaskipanini skal sendast BankNordik skrivliga og fær gildi, tá ið hon er skrásett í bankanum.

Um ein persónur í familjuni, ið er omanfyri 18 ár, tekur seg burtur úr fyrimunaskipanini, hevur hetta við sær, at øll familjan verður uppsøgd. Um annar persónur í familjuni er omanfyri 18 ár, verður hesin kunnaður um uppsøgnina og kann eftir hetta melda seg

til skipanina sum einstaklingur, um hesin lýkur neyðugu treytirnar. Eitt barn, ið er tilmeldað saman við familju síni, verður sjálvvirkandi meldað úr fyrimunaskipanini, tá ið tað fyllir 18 ár. Barnið, sum fyllir 18 ár, kann tó eftir hetta somuleiðis melda seg til fyrimunaskipanina, um tað lýkur treytirnar.

Um ein persónur í familjuni í eitt fyribils tíðarskeið ikki er skrásettur á sama bústaði sum restin av familjuni, orsakað av arbeiði uttanlands, starvi ella sjúku, kann viðkomandi verða meldaður til fyrimunaskipanina og vera partur av uppgerðini av samlaðu fíggjarviðurskiftunum við bankan saman við restini av familjuni í upp til tvey ár eftir fráflytingina. Í sambandi við tilhald á røktarheimi ella líknandi verður viðkomandi framvegis mettur sum partur av familjuni.

Um ein persónur í familjuni flytur av øðrum orsøkum, t.d. orsakað av samlívssliti, verður fyrimunaskipanin mett at vera uppsøgd, um samlaðu fíggjarviðurskiftini hjá teimum persónum, ið eftir eru, ikki longur lúka treytirnar fyri viðkomandi stigið í skipanini. Sama ger seg galdandi við deyða. Einstaki persónurin kann tó framvegis vera meldaður til fyrimunaskipanina við støði í egnum fíggjarviðurskiftum.

Kundin/familjan skal kunna BankNordik skjótast gjørligt, tá ið broytingar í viðurskiftunum hjá familjuni fara fram.
BankNordik kann við 3 mánaða freist uppsiga alla fyrimunaskipanina, og afturat døminum, ið er lýst omanfyri, kann BankNordik við somu freist uppsiga fyrimunaskipanina í mun til einstaka kundan/einstøku familjuna.

Um kundin misheldur eina avtalu við BankNordik, kann BankNordik uppsiga fyrimunaskipanina uttan ávaring. Um kundin er tilmeldaður sum partur av eini familju, verður tilmeldingin til fyrimunaskipanina hjá allari familjuni uppsøgd, um bert ein persónur í familjuni misheldur eina avtalu við BankNordik.

Vanligu prísir bankans eru galdandi frá tí degi, útmeldingin/uppsøgnin fær gildi. Prísir bankans eru at finna í teirri til hvørja tíð galdandi prísbók.

**Broyting í fyrimunaskipanini og prísbroytingar**
Bankin kann seta í verk nýggjar fyrimunir uttan freist. Aðrar broytingar í fyrimunaskipanini umframt broyting í prísum og fyrimunum verða fráboðaðar í samsvari við vanligu viðskiftatreytir bankans.

**Játtan um savnan og skifting av upplýsingum umframt marknaðarføring**
Um ein familja meldar seg til fyrimunaskipanina, játtar hvør einstakur persónur í familjuni samstundis, at bankin kann geva hvørjum einstøkum familjulimi, sum er 18 ár ella omanfyri, allar upplýsingar um samlaðu fíggjarviðurskiftini, sum hvør einstakur familjulimur hevur við bankan. Harafturat fevnir játtanin um, at bankin kann geva hvørjum einstøkum familjulimi, sum er 18 ár ella omanfyri, upplýsingar um mishald hjá hinum familjulimunum.

Tá ið kundin/familjan meldar seg til fyrimunaskipanina, játtar kundin/familjan samstundis, at BankNordik kann savna allar upplýsingar, ið eru neyðugar í sambandi við uppgerð av samlaðu fíggjarviðurskiftunum hjá kundanum/familjuni, frá fyritøkum, ið eru knýttar at BankNordik samtakinum.

Tá ið kundin/familjan meldar seg til fyrimunaskipanina, játtar viðkomandi samstundis, at bankin støðugt kann upplýsa kundan/familjuna um galdandi fyrimunirnar umframt møguligar nýggjar fyrimunir í fyrimunaskipanini ella øðrum viðkomandi tænastum hjá BankNordik samtakinum.

Allar omanfyri nevndu játtanir eru fyritreyt fyri luttøku í fyrimunaskipanini.

**Aðrar treytir**
Vanligu viðskiftatreytir bankans eru galdandi fyri fyrimunaskipanina.

---

* Treytað av eini ítøkiligari kredittmeting, ið loyvir bankanum at *fråtaka* allar tænastur og fyrimunir í fyrimunaskipanini.
** Treytað av eini ítøkiligari kredittmeting, ið loyvir bankanum at *fråtaka* allar tænastur og fyrimunir í fyrimunaskipanini.